# Jógvan fegin um at sleppa at skjóta

**– Eg eri onkuntíð spurdur, um eg fór at sleppa at skjóta seinasta skotið, og eg havi svarað, at tað var ikki tað týdningarmesta, bara tað bleiv skotið, sigur Jógvan við Keldu, sum um eina góða viku skjýtur seinasta skotið í Norðoyatunlinum**

SEINASTA SKOT

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Undirsjóvartunnilin verður ein kollvelting í samferðsluni og fer at hava veldugan týdning fyri økið rundan um. Klaksvík, Fuglafjørður, Leirvík, Gøta og Skálafjørðurin eru eitt sterkt øki bæði vinnuliga og mentanarliga, og eg rokni við, at undisjóvartunnilin fer at verða ein miðdepil hesum øki í framtíðini, sigur Jógvan við Keldu*

Landsstýrismaðurin og fyrrverandi borgarstjórin í Klaksvík, Jógvan við Keldu, skal trýsta á knøttin, tá ið seinasta skotið verður latið av í Norðoyatunlinum næsta leygardag.

Jógvan við Keldu var borgarstjóri í Klaksvík, tá ið hugskotið um undirsjóvartunnilin av fyrstan tíð kom, og tað var borgarstjórin sjálvur, sum setti hol á kjakið, sum vardi í eini 15 ár, áðrenn tað gjørdist veruleiki.

– Eg eri onkuntíð spurdur, um eg fór at sleppa at skjóta seinasta skotið, og eg havi svarað, at tað var ikki tað týdningarmesta, bara tað bleiv skotið. Men tá ið tað er sagt, eri eg sjálvandi fegin um, at eg havi fingið heiðurin at skjóta seinasta skotið, sigur Jógvan við Keldu.

### Áheitan um tunnil

Jógvan við Keldu, sum nú landsstýrismaður við innlendismálum, var í 16 ár borgarstjóri í Klaksvík, og tað var miðskeiðis í áttatiárunum, at hugskotið um fasta sambandið um Leirvíksfjørð kom fram alment.

– Í 1986 handaði eg landsverkfrøðinginum eina áheitan um at fara undir at gera undirsjóvartunnil um Leirvíksfjørð, men tað gingu nógv ár, áðrenn hetta gjørdist veruleiki, sigur Jógvan við Keldu.

Seint í nítiárunum var aftur kjak um, hvørt tað var ráðiligt at gera ein undirsjóvartunnil til Norðoyggjar, og fleiri búskaparfrøðingar mæltu frá hesum. Politiski viljin var tó við at venda, og nøkur ár seinni samtykti løgtingið Norðoyatunnilin.

Næsta leygardag verður undirsjóvartunnilin skotin ígjøgnum, og tað verður gjørt við hátíðarhaldi í Klaksvík.

### Kolveting í samferðsluni

Jógvan við Keldu væntar sær nógv av nýggja sambandinum um Leirvíksfjørð.

– Undirsjóvartunnilin verður ein kollvelting í samferðsluni og fer at hava veldugan týdning fyri økið rundan um. Klaksvík, Fuglafjørður, Leirvík, Gøta og Skálafjørðurin eru eitt sterkt øki bæði vinnuliga og mentanarliga, og eg rokni við, at undisjóvartunnilin fer at verða ein miðdepil hesum øki í framtíðini, sigur Jógvan við Keldu.

Ætlanin er, at koyrandi verður um Leirvíksfjørð seinast 1. august í 2006, men møguleiki er fyri, at tunnilin letur upp áðrenn tað, um arbeiðið gongur væl.

## FAKTA

Arbeiðið at gera Norðoyatunnilin byrjaði í september mánaði 2003. Í desember mánaði sama ár var fyrsta skotið latið av í Leirvík, og nakrar mánaðir seinni skutu teir í Klaksvík.

Norðoyatunnilin kostar umleið 355 milliónir krónur at gera. Landið rindar 235 milliónir, og restin skal fíggjast nýtslugjaldi.

Norðoyatunnilin verður 6,3 kilometrar til longdar, og ætlanin er, at tunnilin letur upp seinasta 1. august 2006.

# Lena hitar upp fyri enskan stjørnubólk

**– Tá ið tú hitar upp fyri ein annan bólk, mást tú gera tær greitt, at fólkini eru í grundini ikki komin at lurta eftir tær, sigur Lena Anderssen, sum gleðir seg til framførsluna leygarkvøldið, tá ið hon skal hita upp fyri Roxy Music á konsert í Horsens**

TÓNLEIKUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Leygardagin skulu Lena Anderssen og Niclas Johannessen royna nakað, sum tit ikki hava roynt áður. Tey skulu nevniliga hita upp fyri kenda enska bólkin Roxy Music, sum hevur konsert í Horsens.

– Tá ið tú hitar upp fyri ein annan bólk, mást tú gera tær greitt, at fólkini eru í grundini ikki komin at lurta eftir tær, men í hesum føri eftir Roxy Music. Tí verður tað ein spennandi avbjóðing hjá okkum at fáa fólkini við, meðan vit spæla, sigur Lena Anderssen.

Tað var út ímóti 8.000 fólk til staðar, tá ið Roxy Music hevur konsert í Lunden í Horsens.

### Spæla einsamøll

Lena Anderssen sleppur at spæla í ein góðan hálvan tíma, og hon fer at syngja sangir av seinastu fløguni hjá sær og aðrar sangir, sum hon og Niclas hava skrivað.

Lena og Niclas hava ikki nakran bólk afturat sær til framførsluna leygardagin, og tað vera tí bara tey bæði á pallinum til framførsluna.

– Hetta verður spennandi. Tað er stuttligt, tí at tað verður nógv fólk og lurtað, og eisini tí at vit spæla saman við einum so kendum bólki, sigur Lena Anderssen.

Konsertin verður í Lunden í Horsens leygarkvøldið kl. 20.00

## Planet.fo flúgvandi byrjan

Nýggja ungdómssíðan hjá Føroya Tele og Sosialinum hevur fingið sera góða byrjan, síðani hon varð løgd á netið fyri einari góðari viku síðani. Síðan er úrslitið av einum samstarvi millum Føroya Tele og Sosialin.

Og tað var vorðið sum byrjan, tí hesar fyrstu dagarnar hava umleið 2000 fólk dagliga vitja Planet.fo. Tað eru 10 ferð so nógv fólk, sum vitjaðu gomlu Planetsíðuna.

Ein táttur á síðuni er eitt kjak, og har hevur eisini stórur áhugi verið fyri at sleppa uppí. Fleiri enn 700 fólk hava skrásett seg í kjakinum, sum gongur lívliga um tónleik, sms-boð og onnur evni.

**ek**

## Guðrun hevur úr at gera

Guðrun Sólja Jacobsen hevur úr at gera í Danmark í summar. Hon hevur longu havt nógvar framførslur til summartiltøk kring Danmark, og fleiri spennandi uppgávur bíða fyri framman.

Leygarkvøldið skal Guðrun syngja í Ålbenrå, og í næstu viku í Ålborg. Síðani koma framførslur á Nibe Festivalinum og til Sommerrock-tiltøk í Struer, Herning, Svendborg, Høng, Kolding og Aabenraa. Harafturat skal hon eisini syngja í Brønderslev og Nykøbing Mors.

Guðrun Sólja Jacobsen kom av álvara fram aftur í Danmark, tá ið seinasta kappingin um at gerast Stjørna í eitt kvøld var hildin á DR, og tá ið hon gav nýggja fløgu út fyrr í ár.

**ek**

## Songrøddin flytir

Fyrireikararnir av Ársins Songrødd hava gjørt av, at finalan í kappingin skal flytast. Orsøkin er, at finalan upprunaliga skuldi verða Jóansøkuvikuskiftið, men tá er ein ørgrynna av tónleikatiltøkum kring landið.

Fyrireikarnir siga, at dekan ov nógv kapping var um áskoðararnar, og at tey tí valdu at flyta finaluna fyri at geva Føroya størstu sangkapping røttu karmarnar. Finalan verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði tann 16. juli ístaðin.

**nud**